**Nr. 103/2014**

**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**fyrispurning nr. 103/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Kristinu Háfoss, lögtingskvinnu, um um avleiðingarnar fyri Føroyar, tá Danmark flytir bankalóggávu og fíggjareftirlit til ES.**

1. Hvørjar eru niðurstøðurnar hjá arbeiðsbólkinum, ið varð settur at greina avleiðingarnar fyri Føroyar og Grønland, av, at Danmark flytir bankalóggávu og fíggjareftirlitið – heilt ella partvíst - til ES?

   Svar: Endaligu niðurstøðurnar eru ikki tøkar, tá arbeiðsbólkurin enn ikki er liðugur við frágreiðingina.

2. Um endaligar niðurstøður framvegis ikki eru gjørdar, hví dregur arbeiðið út?

   Svar: Umboðini fyri Danmark, Føroyar og Grønland, sum mynda arbeiðsbólkin, arbeiða framvegis við at greina nakrar av torgreiddu spurningunum, ið hava stungið seg upp, nú Danmark umhugsar at luttaka í styrkta evropeiska bankasamstarvinum. Óvist er framvegis nær endaliga frágreiðingin verður liðug.

3. Um endaligar niðurstøður framvegis ikki er gjørdar, eru nakrar ávegis niðurstøður gjørdar? Um so er, hvørjar eru hesar?

   Svar: Danska Vinnu- og vakstrarmálaráðið almannakunngjørdi í apríl 2015 frágreiðingina, *"Rapport om mulig dansk deltagelse i det styrkede banksamarbejde".* Í kapittul 16 í hesi frágreiðing eru hesar ávegis niðurstøður gjørdar:
   1) ES-rætturin loyvir ikki, at Føroyar og Grønland luttaka beinleiðs í styrkta bankasamstarvinum, tá styrkta bankasamstarvið er partur av ES-bygnaðinum, har einans ES-limalond kunnu luttaka.
   2) Mett verður, at Føroysku bankarnir heldur ikki kunnu blíva umfataðir av styrkta bankasamstarvinum, við at flyta høvuðssæti til Danmarkar.

4. Ætlar landsstýrismaðurin, at føroyskir bankar eisini – um møguligt - skulu undir eitt ES-fíggjareftirlit?

   Svar: Nei, tað ætlar landsstýrismaðurin ikki. Og sum svarið uppá spurning 3 vísur, so ber tað heldur ikki til, um onkur vildi tað.

5. Ætlar landsstýrismaðurin at flyta enn meira lóggávuvald úr Løgtinginum, niður til danskan ráðharra og/ella til ES innan fíggjarliga økið frameftir?

   Svar: Landsstýrismaðurin hevur ikki flutt lóggávuvald úr Løgtinginum. Eg havi gjørt mær ómak fyri at tryggja, at øll lóggáva á bankaøkinum, ið verður sett í gildi í Føroyum, skal ígjøgnum Føroya Løgting og allar kunngerðir, ið lýstar verða fyri Føroyar, skulu góðkennast av Føroya Landsstýrið, áðrenn tær verða settar í gildi. Soleiðis hevur arbeiðsgongdin verið og soleiðis er arbeiðsgongdin framhaldandi.

6. Hvussu nógvir løgfrøðingar starvast í Fíggjarmálaráðnum?

   Svar: Tá Fíggjarmálaráðið arbeiðir við bankalóggávu, er tað í tøttum samstarvið við løgfrøðingar, bæði í føroysku umsitingini og í danska fíggjareftirlitinum. Hesin leistur hevur riggað væl og eru arbeiðsgongdirnar við tíðini vorðnar alt meira kjølfestar.

7. Hvat ger landsstýrismaðurin fyri at styrkja fyrisitingina við fólki við løgfrøðiligari servitan innan ES-rætt og fíggjarliga lóggávu?

   Svar: Bankamál er framvegis danskt málsøkið. Um føroyingar ynskja at yvirtaka málsøkið, tá er tíðin at seta føroyskt Fíggjareftirlit á stovn, stovna føroyskan innskjótaragarantifond og gera samstarvsavtalur við ES á bankaøkinum og tá verður tørvur á nógvum fólki við servitan innan ES-rætt og fíggjarliga lóggávu.

Argir, hin 19. juni 2015

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður